Landssjúkrahúsið fyllir 80:

Hans Pauli er bjartskygdur

Landsstýrismaðurin Hans Pauli Strøm (vm) og sjúkrahússtjórin Poul Geert Hansen avmyndaðir framman fyri nýggja sjúkrahúsbygninginum, sum eftir ætlan skuldi takast í nýtlsu á 80 ára føðingardegnum hjá Landssjúkrahúsinum mánadagin. Sambært teimum báðum verður nýggi bygningurin tikin í nýtslu í summar

- Hóast avmarkað fíggjarligt rásarúm og trongar karmar vóna og vænta vit, at stór framstig liggja fyri framman á Landssjúkrahúsinum og í føroyska sjúkrahúsverkinum sum heild, sigur nýklakti landsstýrismaðurin í almannamálum í sambandi við føðingardagin hjá Landssjúkrahúsinum mánadagin. Hans Pauli Strøm undirstrikar eisini, at allur peningurin er settur av til nýggja bygningin, sum verður tikin í nýtslu í summar

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
Heini í Skorini
heini@sosialurin.fo

Mánadagin 23. februar hevur Landssjúkrahúsið 80 ára føðingardag. Upprunaliga ætlanin var, at nýggi bygningurin skuldi vera liðugur og til reiðar at taka í nýtslu til føðingardagshøvið, men orsakað av m.a. valinum er hetta seinkað til í summar.

– Tann ljósa og góða søgan um føðingardagin og nýggja bygningin er sjálvsagt ávirkað av soltnu fíggjarligu støðuni, sum er nógv verri, enn ein helt fyri nøkrum mánaðum síðani, men hóast tað er orsøk til bjartskygni, tí við nýggja bygninginum eru onnur stór framstig á veg, sigur Hans Pauli Strøm. Landsstýrismaðurin í almannamálum undirstrikar, at allur peningurin er settur av til

núverandi verkætlan við nýggja bygninginum, so negativa búskaparstøðan fer ikki at ávirka just hetta arbeiðið.

– Hetta eru íløgur, sum eru gjørdar og sum ikki skulu fáast til vega nú, so bygningurin verður tikin í nýtslu skjótast gjørligt, sigur Hans Pauli Strøm. Nú sjálvur bygningurin er liðugur, væntar útgerð fyri góðar 40 milliónir, meðan 6-7 milliónir skulu nýtast til rakstur í nýggja bygninginum. Samlaða verkætlanin hevur kostað millum 190 og 200 milliónir krónur.

Aðrar umvælingar

Sambært Hans Paula Strøm setir stóra verkætlanin við nýggja bygninginum gongd á annað arbeiði, sum liggur á láni á Landssjúkrahúsinum.

– Í nógv ár hava umvælingar í gomlu bygningunum verið átrokandi, og eftir at nýggi bygningurin um nakrar mánaðir verður tikin í brúk, kann hol endiliga setast á umvælingar aðrastaðni, sigur Hans Pauli Strøm, sum samstundis vísir á fleiri onnur positiv árin av nýggja bygninginum.

– Raksturin verður rationellari, bíðilistarnir vera ikki eins drúgvir, færri fólk verða send uttanlanda í viðgerð, og sum heild er talan um eina modernisering, sum lyftir støði á Landssjúkrahúsinum. Landsstýrismaðurin leggur afturat, at størri dentur nú eisini kann leggjast á ambulanta viðgerð, meðan færri sjúklingar verða innlagdir.

Útreiðslur í niðurgongutíðum

Skulu stóru ætlanirnar hjá landsstýrismanninum um umvælingar o.a. fremjast, er talan um sera stórar útreiðslur komandi árini. Sambært honum skulu ábøtur og viðlíkahald av Landssjúkrahúsinum fremjast nógv ár fram, og kostnaðurin fyri hetta er hvørt ár nakað omanfyri 30 milliónir. Spurdur, um hetta ikki er órealistiskt og í mótsøgn við áðurnevndu trongu fíggjarligu fortreytir, er bjartskygni at hóma hjá Hans Paula.

– Tað er rætt, at tað verður rættiliga avmarkað við peningi í framtíðini, men hetta eru so ítøkiligu ætlanirnar, og vónandi fáa vit pening settan av til hesar átroðkandi ábøtur komandi árini, sum Landssjúkrahúsið í fleiri ár hevur tørvað, sigur ein avgjørdur Hans Pauli Strøm. Hann leggur afturat, at tað leingi hevur verið ein politiskur málsetningur at fara undir ábøtur og umvælingar, eftir at nýggi bygningurin verður tikin í nýtslu, og fyribils eru ætlanirnar óbroyttar, slær landsstýrismaðurin fast, sum sostatt hevur stórar og kostnaðarmiklar framtíðarætlanir um ábøtur á Landssjúkrahúsinum, sum mánadagin fyllir 80 ár.

Landssjúkrahúsið 80 ár

Dronning Alexandrines Hospital bleiv tikið í brúk 23. februar 1924. Bygningurin er ikki nógv broyttur síðan tá. Høgrumegin sæst Tuberklastøðin, sum bleiv tikin burtur seinni

Mánadagin 23. februar eru 80 ár liðin síðan Dronning Alexandrines Hospital varð tikið í brúk. Dronning Alexandrines Hospital avloysti Færø Amts Hospital, sum var bygt í 1829. Landssjúkrahúsið var liðugt at taka í brúk í 1969

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo

Grundarsteinurin til Dronning Alexandrines Hospital bleiv lagdur 23. juni 1921 av Christian kongi X, og húsið bleiv tikið í brúk 23. februar 1924.

Dronning Alexandrines Hospital avloysti Færø Amts Hospital, sum var bygt í 1829.

Grundarsteinurin til Landssjúkrahúsið bleiv lagdur 19. juni 1962 av Petur Mohr Dam, táverandi løgmanni.

Fyri skjótt 35 árum síðan, í apríl 1969, varð allur tann nýggi bygningurin tikin í brúk. Sjúkrahúsið var tá mormerað til 158 seingjapláss.

Í summar verður nýggi bygningurin á Landssjúkrahúsinum tikin í brúk. Bygningurin er í fimm hæddum og samlaða gólvviddin er 5.600 ferðmetrar

Hesi 80 árini eru ómetaliga stórar broytingar farnar fram á øllum økjum, sum tað sæst á myndunum.

Sjúkrabilur í frá krígsárunum – kundi verið ein Bedford

Mynd: Landssjúkrahúsið

Landssjúkrahúsið, sum bleiv tikið í brúk í 1969, og nýggi bygningurin, sum verður tikin í brúk í summar

Mynd: Landssjúkrahúsið

Sjúkrahússtjórin:

Framtíðin er upp til politikararnar

– Gongur alt eftir ætlan, verður nýggi og framkomni bygningurin latin upp og tikin í nýtslu beint undan summarfrítíðini, sigur sjúkrahússtjórin Poul Geert Hansen. 145 av 200 milliónum eru goldnar, og sjúkrahússtjórin sigur seg vóna, at politiskur vilji verður fyri neyðugu játtanunum, sum enn resta í at fullføra verkætlanina

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
Heini í Skorini
heini@sosialurin.fo

Hóast nýggi bygningurin ikki verður tikin í nýtslu mánadagin á 80 ára føðingardegnum hjá Landssjúkrahúsinum, kann stjórin Poul Geert Hansen sum plástur á sárið lova starvsfólki, sjúklingum og vitjandi ræst kjøt og súpan. 6. mars verður stór veitsla á Hotel Føroyum, og móttøka verður, tá nýggi bygningurin letur upp beint undan summarfrítíðini.

Meiri peningur skal til

Sjúkrahússtjórin metir verkætlanina kosta 190-200 milliónir, og av teimum eru 145 milliónir goldnar. Hesin peningur er farin til sjálvan bygningin og tunga útgerð. Poul Geert Hansen metir tó, at verkætlanin saktans kann fara uppum tær 200 milliónirnar seinni.

– Umframt restina av útgerðini skal forhøll gerast, meðan bygningarnir eisini skulu byggjast saman, so verkætlanin er ikki liðug, tá vit flyta inn, sigur sjúkrahússtjórin. Poul Geert Hansen væntar tó, at neyðugi peningurin er til taks, og fær hann illa ímyndað sær annað.

– Men tað fer altíð at vera ein politiskur spurningur og ein politisk avgerð, hvussu nógv vit fáa játtað, men í løtuni er átrokandi at fáa pening til rakstur og útbúna, sigur Poul Geert Hansen.

Við samlaðu búskaparligu støðuni í huga kann ein sambært sjúkrahústjóranum altíð óttast tað ringasta, men hann væntar og vónar, at verkætlanin kemur undir land í summar.

Í nýggja bygninginum eru fimm hæddir, sum sambært sjúkrahústjóranum eru framkomnar og seta allar sjúklingin í miðdepil. Í nýggju hølunum verður nýggj seingjadeild, medisinsk kanningardeild (laboratoriið), skurðviðgerðarstovur, bráðfeingismóttøka og rannsóknarstovur.